

## Chávez má spara

Altjóða fíggjarkreppan og fallandi oljuprísur noyða nú venesuelska forsetan Hugo Chávez til at fremja nakrar umfatandi sparingar á fíggjarlógini. Forsetin hevur tó gjørt greitt, at sparingarnar verða framdar "í sosialistiskum anda", sum hann málber seg. Venesuela er meint rakt av fíggjarkreppuni, sum hevur havt við sær, at eftirspurningurin eftir olju, sum er landsins høvuðsútflutningsvøra, er minkaður nógv. Í sama tíðarbili er prísurin á olju fallin nógv - úr 147 dollarum fyri tunnuna seinasta summar niður í einar 50 dollarar í dag.

## Ungur drápsmaður

Í Týsklandi hevur løgreglan handrikið ein 17 ára gamlan drong, sum er undir illgruna fyri at dráp. Løgreglan tók drongin í gjár, eftir at hann hevði ringt til pápa sín og sagt, at nakað ræðuligt var hent, og at mamma hansara var deyð. Pápin ringdi til løgregluna, sum fann tann unga drongin fullasn uttan fyri íbúðina hjá mammuni. Inni í íbúðini fann løgreglan ta 54 ára gomlu mammuna deyða. Undir liðini á líkinum lá ein blóðug øks, og sambært løgregluni í Frankfurt er eingin ivi um, at tann 17 ára gamli drongurin hevur myrt mammu sína við øksini.

# Konserthús á breddan



*Føroysk tónleikafeløg taka nú lógvatak fyri at fáa eitt hóskandi konserthús í Havn. Fríggjakvøld var fundur um tiltakið, har greitt var frá týdninginum av einum slíkum hús, og hvat krevst av ljóðumstøðunum fyri at fáa eitt so væl virkandi konserthús sum gjørlig*

**Tónleikafeløg kring landið høvdu sítt fyrsta tiltak fríggjakvøldið, har umrøtt varð hvussu eitt nýtt konserthús í høvuðsstaðnum skal virkað. Hvar er ikki so umráðandi, men tað skal vera eitt hús ætlað tónleikinum fyrst og fremst, siga fyrireikararnir**

TÓNLEIKUR
*Eilen Anthoniussen*
*eilen@sosialurin.fo*
*Myndir: Álvur Haraldsen*





Fríggjakvøldið skipaðu føroysk tónleikafeløg fyri fundi í Norðurlandahúsinum, sum snúði seg um eitt nýtt konserthús í Havn. Leingi hevur verið tosað um at fáa eitt nýtt konserthús til høldar í Havn, og nú hava tónleikafeløg úr øllum landinum sligið seg saman um at fáa fremja verkið.

- Hetta er ikki bert ein trupulleiki í Havn. Vit halda, at eitt slíkt konserthús eisini hevur stóran týdning fyri alt landið, sigur Edvard Nyholm Debess, ein av fyrireikarunum av tiltakinum.

Nakað av fólki var komið saman í Norðurlandahúsinum, har tveir fyrilestrahaldarar greiddu frá um hvussu eitt slíkt konserthús skal virka. Gunnar Madsen, ið hevur drúgvar royndir frá danska tónleikasambandinum ROSA og Spot festivalinum, greiddi áhoyrarunum frá hvussu umráðandi eitt gott konserthús hevur fyri lokalsamfelagið. Sjálvur hevur hann royndir frá at byggja upp VoxHall í Århus, og kundi í tí sambandi vísa á hendan týdningin við at hava eitt dynamiskt og livandi konserthús.

Harafturat var Johannes Steingrund, ið er útbúgvin ljóðtøkningur og sivilverkfrøðingur hjástaddur á fundinum. Hann eigur og rekur smápartafelagið Steingrund Akustik, og hevur verið við í ymsum verkætlanum, har hann hevur veitt sína vitan um ljóð í samband við bygging. Johannes Steingrund greiddi frá hvussu umráðandi tað er at hava eitt konserthús við góðum ljóðviðurskiftunum, og hvussu tað skal hanga saman. Hansara ráð vóru, at tað fyrsta fyrireikararnir eiga at gera, er at seta síni ynski á lista, og meta um hvat krevst fyri at fáa so gott ljóð sum gjørligt.

### Tónleikur burturav

Fyri føroysku tónleikafeløgini er eitt konserthús sera átroðkandi í løtuni.

- Tað er ikki so umráðandi fyri okkum, um húsið er nýtt ella gamalt. Men ljóðið skal vera í lagi. Tað skal til dømis vera væl egnað til endamálið, gjarna vera høgt til loftið, og helst vilja vit sleppa undan óljóðið uttanífrá, sigur Edvard Nyholm Debess.

Við at taka lógvatak saman við hinum feløgunum kring landið, og góðum samstarvi við Tórshavnar kommunu, vóna fyrireikararnir at nýggja konserthúsið verður veruleiki innan rúma tíð. Ein fundur hevur verið millum fyrireikarar og borgarstjórarnar í Tórshavnar kommunu, og ein annar fundur er settur á skrá.

- Vit ynskja eitt konstruktivt samstarv við kommununa, har vit eisini kunnu bjóða okkara kompetensur í hesum arbeiðnum. Tað er umráðandi fyri okkum feløg at standa saman um hetta arbeiðið, og tað vísir seg at øll eru í sama báti. Tørvurin er stórur millum fólk, og vit hava bara møtt vælvild frá hinum feløgunum.

Arbeiðið við konserthúsinum í Havn, er enn í byrjunarfasuni. Um tvær vikur skulu umboð frá stigtakarum hittast til nýggjan fund millum borgarstjórarnar í Tórshavnar kommunu.

- Vit hava sum so einki krav til hvar hetta konserthúsið skal vera í býnum, men meir sentralari, jú betri. Og tað skal vera eitt tónleikahús burturav.